**<u>At greina og tulka eina stuttsøgu</u>**

**Byrjan**

Les søguna væl og virðiliga ígjøgnum.

• Kanna ókend orð í orðabók

• Greina fløkjasligar setningar

Um tekstin

Greið frá tí, sum tú veitst um tekstin, so sum

• hvat slag av teksti er talan um

• hvør hevur skrivað hann

• nær hann er skrivaður og givin út

**Søgugongdin**

Greið frá, hvør kjarnin í søguni er (t.e. søgugongdin stytt til fáar reglur).

**Søgubygging**

Greið frá, hvussu søgan er bygd upp.

• Er søgan t.d. sett saman av brotum, skiftir hon í tíð, ella er hon í tíðarrøð (t.e. kronologisk)?

• Er søgan skipað við eini byrjan, einari miðju við hendingum og einum enda?

• Ella byrjar hon in medias res?

• Hvar er hæddin ella vendin í søguni?

• Er søgan long, er hent at býta hana sundur í partar og gera yvirskriftir. Eisini ber til at gera eina spenningsfarmynd, ið vísir, hvussu spenningurin í søguni er bygdur upp.

**Frásøgufólk**

Er søgan skrivað í 1., 2. ella 3. persóni?

Hvør sigur hesa søguna?

Greið frá sjónarhorninum. Eru persónarnir lýstir

• innanífrá

• uttanífrá ella

• bæði?

**Tíðin**

***Frásagnartíð***

Nær er søgan skrivað?

Er søgan skrivað í nútíð ella tátíð?

***Søgutíð***

Nær fara hendingarnar í søguni fram? Vís á fyribrigdi í tekstinum, sum geva grundir fyri tíni tíðarfesting.

Hvussu long er søgutíðin? Tað er tíðin, sum gongur frá søgan byrjar, og til hon endar.

Eru afturlítandi brot í søguni?

Um søgan er long, er hent at tekna eina tíðarlinju av søgugongdini.

***Lesaratíð***

Ber saman hendingar/umstøður í søgutíðini og tíðini nú og greið frá, hvat er øðrvísi nú.

Kundi henda søgan eins væl farið fram í dag? Gev grundir fyri tínum sjónarmiðum.

**Stað**

Hvar fer søgan fram? Greið frá tí, sum tú veitst um staðið/støðini.

- Hvar eru persónarnir staddir?
- Verða støð nevnd við navni?
- Ella ber til at gita ígjøgnum upplýsingar, hvar søgan fer fram?

**Persónslýsingar**

Lýs teir týdningarmestu persónarnar í søguni.

- Greið frá tí, sum tú veitst um teir (útsjónd, eginleikar, arbeiði, familju, fíggjarligar umstøður, samfelagsstætt o.s.fr.).
- Hvør er høvuðspersónurin?
- Hvørjir eykapersónar eru?
- Greið frá sambandinum ímillum persónarnar, um tað er viðkomandi fyri søgugongdina.

**Sosiala umhvørvið**

Í summum søgum hevur sosiala umhvørvið týdning fyri stríðið í søguni.

- Hvar starvast persónarnir?

• Hvørjar stættir hoyra teir heima í?

• Hevur teirra støða í samfelagnum týdning fyri søgugongdina?

• Elvir teirra støða til stríð í søguni? Hvussu?

**Málið og skrivingarlagið**

Hvussu er málið í søguni?

• Er málið gerandisligt ella háfloygt?

• Er stílurin knappur við stuttum setningum?

• Hvat verður serliga væl lýst (náttúra, persónar, samfelag ella annað)?

• Hvussu er huglagið í søguni? Kanna t.d. lýsingarorðini.

**Myndamál**

Eru myndamál og samanberingar í søguni? Vís á dømi í tekstinum

**Tulking og tema**

Tak saman um tað, sum tín greining vísir. Vert er at geva hesum serligan ans, tá ið tú tulkar:

• Hvønn týdning hevur heitið á søguni?

• Hvørjir mótsetningar eru í søguni?

• Hvørji eru høvuðsevnini? Eru nøkur duld evni at hóma?

Hvørji eru hugdýpingarevnini?

**Millumtekstleiki/at seta í frásjón**

Er nakað millumtekstasamband í søguni?

Kennir tú aðrar tekstir (yrkingar, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

5

**Boðskapur/hugburður**

Hevur søgan ein serligan boðskap til lesaran?

**Tín hugsan**

Hvat heldur tú um hesa søguna? Gev grundir fyri tínum sjónarmiðum.Hvørjir tankar vekjast í tær? Er henda søgan viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

.